# Kommunulækna-viðtalan

Hjá Kára Rasmussen í J. Broncksgøtu 7 byrjar 3. januar 2005.

Telefonviðtala millum 8-9.

Bílegging av tíð og onnur avgreiðsla millum 9-11.

**Kári Rasmussen**
Tlf. 302500

# Tórshavnar Bátafelag

Ynskir øllum limum og viðskiftafólki eitt gott og eydnuríkt nýggjár við tøkk fyri tað farna.

Við bátakvøðu

**Nevndin**

# Hagafundur

Lýst verður til hagafund fyri Strandahaga í Klaksvík, í skúlanum á Ziskatrøð leygardagin 15. januar 2005, kl. 20.00.

**Fundarskrá:**
1. Grein 8 í hagalógini
2. Ymiskt

**Hagastýrið**

# Bókhaldari

Fyri ein av kundum okkara, eitt reiðaravirki, verður søkt eftir bókhaldara at byrja skjótast tilber.

**Starvslýsing:**
Starvið umfatar bókføring, har virksemi er skipað í fleiri feløg. Herumframt avrokning- og lønarbókhald og annars vanligt skrivstovuarbeiði.

**Førleikakrøv:**
Tað er ein treyt, at tann, ið settur verður hevur hollan praktiskan førleika, og kann arbeiða sjálvstøðugt.

**Setanartreytir:**
Starvið er heiltíðarstarv, løn og setanarviðurskifti eru treytað av starvsroyndum og útbúgving.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Páll Højgaard, tlf. 441666.

**Umsóknir:**
Skrivlig umsókn við avriti av møguligum prógvum v.m. verður at senda innan 1. januar 2004 til:

**Sp/f Grannskoðarastovan á Skála**
Dalabøur
480 Skála

# Stuðul frá Nordplus Granni

**Nordplus Granni er skipan, sum skal stimbra samstarv millum stovnar í Norðurlondum øðrumegin og grannalondini, Estland, Lettland, Litava og Norðurvesturrussland hinumegin.**

Nordplus granni skal menna netverkssamstarvið millum Norðurlond og norðurlendsku grannalondini Estland, Lettland, Litava og Norðurvesturrussland við denti á útbúgving og læring. Skipanin er galdandi fyri alla útbúgving, frá barnaskúlanum til universitettstøði, eisini vaksnamannaundirvísing. Útbúgvingarstovnar og aðrir stovnar í Norðurlondum og omanfyri nevndu grannalondum kunnu søkja um fíggjarligan stuðul til tiltøk og verkætlanir, sum fremja útbúgvingarfelagsskapin og fremja og menna netverk og samstarv millum sjálvbodnar stovnar í Norðurlondum og nærumhvørvinum. Netverkini, sum fáa stuðul, skulu í minsta lagi hava luttakarar úr fýra ymiskum londum, tvey úr Norðanlondum og tvey úr grannalondunum.

Í 2004 og 2005 er serliga ætlanin at stuðla:
- Útbúgving og arbeiðslív
- Serundirvísing og nýhugsandi skúlum.

**Umsóknarfreistirnar eru 1. februar 2005 og 2006.**

*Umsóknarfreistirnar til hinar fýra Nordplus-skipanirnar eru:*
Nordplus Vaksin – Umsóknarfreistir:
1. mars og 1. okt. 2005 og 2006
Nordplus mál – Umsóknarfreistir:
1. februar og 15. oktober 2005 og 2006
Nordplus – Umsóknarfreistir:
1. februar 2005 og 2006
Nordplus Junior – Umsóknarfreistir:
15. mars 2005 og 2006.

Meiri fæst at vita á www.ciriusonline.dk
ella hjá Altjóða Skrivstovan í Tórshavn, tlf. 322065
e-mail: ask@ask.fo · www.ask.fo

# Frá Búnaðarstovuni og Búnaðargrunninum

Løgtingslógirnar nr. 20 og 21 frá 17. mai 2004 um landsjørð og búnaðargrunn eru lýstar at koma í gildi 31. desember 2004. Sostatt verður Føroya Jarðarráð avtikið frá hesum degi, samstundis sum Búnaðarstovan og Búnaðargrunnurin verða sett á stovn.

Búnaðarstovan og Búnaðargrunnurin koma at hýsast í R. C. Effersøesgøtu 4, har Føroya Jarðarráð hevur hildið til.

**Búnaðarstovan hevur:**

| | |
|---|---|
| telefonnr. | 30 80 30 |
| fax. nr. | 30 80 31 |
| teldupostadr. | bunadarstovan@fj.fo |

**Búnaðargrunnurin hevur:**

| | |
|---|---|
| telefonnr. | 35 35 80 |
| fax. nr. | 35 35 81 |
| teldupostadr. | bunadargrunnurin@fj.fo |

**Búnaðarstovan og Búnaðargrunnurin**

# Stuðul frá Nordplus

**Nordplus er ein skipan fyri studentar, lærarar og fyrisiting innan hægri útbúgvingar í Norðurlondum.**

Nordplus skipanin skal fremja almenning, kjølfesti, menning og fakligt innihald í netverkum millum universitet og aðrar útbúgvingarstovnar í Norðurlondum – í fakligum eins og tvørfakligum høpi – og skal fremja flytføri hjá lesandi og lærarum í Norðurlondum.

Veittur kann vera stuðul til t.d.:
- Netverk millum hægri skúlar, sum gera felags undirvísingartilfar og lestrartilboð.
- Starvsvenjing ella lestur hjá studentum í einum øðrum norðurlandi. Uppihaldið kann vera frá 1 til 12 mánaðir. Eisini lærarar kunnu søkja um stuðul at fara til annað Norðurland.

**Umsóknarfreistirnar eru 1. februar 2005 og 2006.**

*Umsóknarfreistirnar til hinar fýra Nordplus-skipanirnar eru:*
Nordplus Vaksin – Umsóknarfreistir:
1. mars og 1. okt. 2005 og 2006
Nordplus Granni – Umsóknarfreistir:
1. februar 2005 og 2006
Nordplus Mál – Umsóknarfreistir:
1. februar og 15. oktober 2005 og 2006
Nordplus Junior – Umsóknarfreistir:
15. mars 2005 og 2006.

Meiri fæst at vita á www.ciriusonline.dk
ella hjá Altjóða Skrivstovan í Tórshavn, tlf. 322065
e-mail: ask@ask.fo · www.ask.fo

# Leiðari

Søkt verður eftir leiðara, til nýggja handil okkara inni á Skála at byrja 1. februar ella eftir nærri avtalu.

**Vit vænta at:**
- tú hevur hollan kunnleika til matvøruhandil frá núverandi ella fyrrverandi arbeiði
- tú er virkin og kreativur kann syrgja fyri at vit hava ein fyrsta floks matvøruhandil, sum er ájavnt við teir bestu í landinum
- tú hevur eyga fyri dygd og búskapi

Løn samb. avtalu.

Eru spurningar til starvið, er tú vælkomin at ringja til okkum á tlf. 51 13 46 ella 21 03 46.

Skrivlig umsókn skal sendast til:

**PE**
**Postboks 3320**
**FO-110 Tórshavn**

# AWI 27 til sølu

Hevur fiskiloyvi 5B. Er vælútgjørdur við nautiskum greiðum, 4 fullautomatiskum vágasnellum, línuspæli og línu. 110 HK Volvo Penta motor.

**Tlf. 223231**